Argir: des. 2022
FGj. j.nr.:
(at tilskila í svari)
Tygara j.nr.:

ALMENNIR STOVNAR

**Ymisk viðurskifti, nú roknskapurin fyri 2022 skal verða gjørdur liðugur**

Nú farið verður undir at leggja síðstu hond á roknskapin fyri 2022, fer Gjaldstovan at biðja stovnarnar um:

- At kanna, at tíðaravmarkingar av útreiðslum og inntøkum um ársskiftið eru rættar. Sí á www.gjaldstovan.fo um evnið, og hvussu farið kann verða fram.
- At stemma av kreditorar um ársskiftið. T.e. at samanbera kontuavrit e.tíl. frá kreditorum við tær rokningar, sum eru skrásettar í FSL fyri 2022. Sí á heimasíðuni um evnið, og hvussu farið kann verða fram. Vandin er fyri, at tað eru rokningar, sum ongantíð eru skrásettar!
- Gera upp ferðaforskot og avrokna hesi.
- At gera upp møguligt endurgjald frá Barsilsskipanini.
- At avrokna yvirtíð og ferðaendurgjald fyri 2022.
- At skuld millum almennar stovnar verður avgreidd í roknskaparárinum fyri 2022.
- At sett verður av móti tapi av debitorum og støða verður tikin til, um krøv verða send til sakførara at heinta inn.
- At anlegg eru skrásett

Eru talan um viðurskifti, sum ikki eru skrásett ella eru skeivt skrásett, er gjørligt at skráseta hetta í 13. skeiði fyri 2022, sum verður latið aftur týsdag 21. februar 2023.

Annars verður mint á øll viðurskifti, sum skulu verða staðfest í sambandi við ársenda – sí skjal EK 76, eisini eru upp á pláss.

g.v.

Gjaldstovan

**Kvíggjartún 1 · Postsmoga 2009 · FO-165 Argir · Telef (+298) 352400 · Fax (+298) 352401 · E-mail gjaldstovan@gjaldstovan.fo**